Nakrir kvæða- og táttayrkjarar.

Vit hava fyrr nevnt, at vit ikki kenna navnið á teim monnum, ið yrktu eldru kvæði okkara frá umleið 14. øld. Øðrvísi er, tá vit koma upp til 1700 — 1800, til tátta-yrkingina og nýggjaru kvæði; tá eru yrkjararnir ofta kendir.

Vit fara í hesum parti at greiða frá kendastu yrkjarunum og verkum teirra og skifta sundur í fýra: A: Menn, sum yrktu tættir í tíðarskeið-num 1700-1800. - B: Nólsoyar Páll. — C: Sjóvarbóndin. — D: Jens Hendrik Djurhuus.

Vit minna á, at hugtakið *táttur* varð lýst frammanfyri í partinum *Kvæði og tættir* á s. 21.

Menn, sum yrktu tættir í tíðarskeiðnum 1700-1800

1. ÁNANIASAR TÁTTUR

Yrkjarin:

Ikki hava menn verið á einum máli um, hvør ið yrkti hendan skemtiliga táttin. Í bók síni um Nólsoyar Páll sigur Dr. Jakob Jakobsen, at yrkjarin eitur Símun í Hørg úr Sumba, meðan Poul F. Joensen í Varðanum 4. bindi vil vera við, at rætti yrkjarin er Tummas í Hørg, bóndi í Laðangarði.

Ánanias, sum er høvuðspersónur í táttinum, var ættaður úr Porkeri — føddur í 1657 —. Um orsøkina til, at tátturin varð yrktur, hevur Poul F. Joensen hesa frásøgn:

»Í teirri tíðini samlaðist fólk eftir sólsetur um fýrstaðin, tí har var ljóst og flótt. Í Laðangarði vóru tvær bríkir, ein hvørjumegin grúgv-una; á aðrari bríkini hevði Ánanias støðugt pláss, og har lá hann aloftast og svav.

Millum teirra, ið samlaðust um grúgvuna í Laðangarði, kundi tosið við hvørt falla um ein og annan, sum hesin ella hasin var illa í øgn við, — so sum henda kann enn á døgum. Men tað undarliga var, at alt, ið bleiv tosað um henda ella handa, við tað sama kom fyri oyruni á viðkomandi. Tey, ið tosað høvdu, trúðu tí ilt hvørt til annað, men eingin hevði vissu fyri, hvør søgusmettan var.

Til Ánanias fekk eingin illgruna, tí hann lá jú og snorksvav sum ein lítil gudseingil á bríkini.

Tað hendi ikki tað smáting í Laðangarði, ið ikki bleiv lýst út.

At endanum fingu tey at vita, at slaturberarin var Ananias, ið tóktist liggja so óskyldigur og sova, men í staðin bara lúrdi og lurtaði.

Eftir henda ljóta atburð er Ánanias óivað koyrdur úr Laðan-garði.

Einaferð seinni var Ananias komin til Sumbiar í dans. Dansað varð í Laðangarði; so er sagt, at Tummas í Hørg, Laðangarðsbóndin, skuldi yrkja táttin, meðan hann dansaði. Ánanias var eisini á gólvinum, tí sum siður var, tá ein táttur varð kvøðin fyrstu ferð, bleiv hann, ið yrkt varð um, lokkaður upp at dansa millum tveir sterkar menn, og mátti so dansa við, til kvøðið var at enda.«

Stuttur samandráttur:

Ánaniasartáttur er í tveimum pørtum. Fyrri partur, sum telur um 80 ørindi, tykist betur yrktur enn seinni, ið telur um 40 ørindi.

Í táttinum verður sagt frá Ánaniasi, sum ger ferð úr Suðuroy norður til Havnar at keypa sær eina byrsu fyri »sína móðurjørð«, sum tikið verður til.

Hann gyklar fyri sær, at við byrsuni skal hann inna brøgd og halda fremmandar ránsmenn burtur frá oynni.

Tá byrsan er keypt, leitar hann suður aftur til Suðuroyar, verður settur upp á land á Hellistanga og fer til gongu suðureftir. Aðrenn hann vinnur vegin fram, díkir regnið av himli, og krútið gerst vátt. Hann er tó ikki ráðaleysur; framkomin tekur hann sær ein pott, koyrir krútið í og heingir upp yvir eldin at turka við tí úrsliti, at potturin fer í luftina, og Ánanias sjálvur og onnur, ið eru í nánd, fáa mein.

2. BRÓKARTÁTTUR


Yrkjarin:

Jógvan Mikkjalsson varð borin í heim í Leynum. Hann verður fleiri ferðir nevndur í tingbókunum (tá skrivaður Joen Michelsen), tí sum tann lógarkøni maður, hann var, møtti hann ofta á tingi sum sakførari. Hann hevði starv við Kongliga handilin í Havn.

Hendan táttin man hann hava yrkt miðskeiðis í 18. øld um ein samtíðarmann úr grannabygdini Kvívík. Tátturin verður mettur at vera ein hin best yrkti av táttum okkara.

Jógvan Mikkjalsson doyði í 1757.

Stuttur samandráttur: Tátturin sigur frá einum útróðrar-degi hjá kvívíkingum, og spott verður rikið við einari ónyttu, Jóannes Niklasson, eyknevndur Brókin, sum ger sær fyri skommum millum rættar menn. Jóannes verður lýstur marghátligur



í útsjónd, beinini stutt, lippan síð — og kloddut er hann ílatin.

Tá teir eru komnir á fiskileið, egnir hann ógvisliga, setir fast í kalva, men ikki orkar hann at draga kalvan inn sjálvur; hann noyðist tí at biðja annan mann draga fyri seg og lovar góða løn. Tá kalvin kemur inn um stokkin, fær Jóannes sporlið undir oyrað »so hann fleyg aftur í barka«, hvør skal siga: »ligg nú har, títt spott«.

Nólsoyar Páll

Einki er at ivast í, at Nólsoyar Páll er kendasti táttayrkjari okkara. Eitt er nú tað, at hann hevur havt frálíkar skaldagávur — men størri týdning man tað hava havt fyri viðgitni hansara, at hann av eftirtíðini verður mettur sum maður-in, sum byrjaði føroyskt tjóðskapar-starv við atfinning síni móti donskum embætismannavaldi í Føroyum.

LÍVSSØGA

Páll Pálsson Nolsøe,vanliga nevndur Nólsoyar Páll, varð borin í heim í Nólsoy í 1766 sum fjórði sonur teirra Páls í Garði og Súsonnu Djónadóttur.

Tað verður sagt — prógv eru tó eingi fyri tí — at Páll og brøður hansara lærdu at lesa og skriva hjá ungum nólsoyingi, ið var latínskúla-lærdur. Páll varð so settur í læru hjá fútanum í Havn, Venzel Hammershaimb; her støðaðist hann tó ikki leingi — hugurin stóð til sjógvin. Hann lærdi sjómanskunn-

leika og siglingarfrøði hjá Mads Winther, bókhaldara við Kongliga Handilin, og so fór hann til stroks — út í verðina at bróta sær ein veg og læra siðir at kenna hjá øðrum og størri fólkasløgum. Í nøkur ár sigldi hann úti og kom víða um, men lítið vita vit um lív hansara hesi árini.



Nólsoyar Páll

Í 1797 kemur hann heim aftur, og nú byrjar av álvara stríð hansara móti einahandli og embætismonn-um.

Hann giftist í 1798 við gentu úr heimbygdini, men hon doyr longu ár 1800, og árið eftir giftist hann upp aftur við gentu av Norðoyri, sum er borin til eitt festi. Stutt aftan á hetta skiftir hann um garð við ein bónda á Biskupsstøð í Klaksvík.

Í 1804 keypir hann eitt strandað skip á sølutingi í Suðuroy og úr leivdunum byggir hann á Fløtuni Fríðu í Vági saman við øðrum monnum Føroya fyrsta deksfar í nýggjari tíð »Royndina fríðu«.

Við hesum fari siglir hann so við farmi millum Danmark og Føroyar. Hetta eru ófriðartíðir — kríggj er millum Bretland og Danmark. Á einari av ferðum sínum verður »Royndin« tikin av bretum og ferst. Páll leitar tá til London við kravi um at fáa nýtt skip. Hann fær játtandi svar, men á ferðini til Føroya við hes-um nýggja skipi — hetta er í 1809 — hvørvur Páll og spurdist ikki aftur.

BÓKMENTAVERK

Vit vita við vissu, at Nólsoyar Páll hevur yrkt fleiri tættir; ofta verður talið sett til hesar 8, men óvist er um hann hevur yrkt teir allar:

Krákuteiti og Eindadrongstáttur, báðir yrktir undan 1800, Jákup á Møn (uml. 1800), Greivin av Orient og Fruntatáttur (1802 — 03), Fuglakvæðið (1806 ella 1807) og Gorplandskvæðið og Krákufrøði (1808).

Nú verður sagt gjølligari frá trimum teim kendastu av hesum táttum: 1) Fuglakvæði. 2) Jákup á Møn. 3) Fruntatáttur.

1. Fuglakvæði.

Hóast heitið er *»Fuglakvæði«*, so er hetta skaldaverk so týðiliga ein táttur við øllum eyðkennum, ein slíkur hevur. Tátturin er í 3 pørtum, harav tann fyrsti eisini er býttur sundur í tvey — tilsamans eru ørindini 229 í tali.

Tátturin er sprottin úr tí mótstøðu, Pálli var fyri av embætismannaávum, tá hann strevaðist fyri at vinna Føroya fólki betri kor handilsliga og á annan hátt. Yrkjarin nýtir tað yrkjarasnildið, at hann letur persón-arnar í fuglaham, og so kann leikur byrja: Páll letur í táttinum argastu mótstøðumenn sínar vera grammar rovfuglar: Kommandanturin er ein falkur, landfútin ein skúgvur, handilsforvaltarin ein gorpur og Havnar sýslumaður er ein kráka. Hesir rovfuglar gera seg í heilum inn á smáfuglarnar (Føroya fólk), men tjaldrið (Nólsoyar Páll sjálvur) verjir smáfuglarnar og spillir rov-fuglunum spælið ferð eftir ferð. Hesir biðja tí ilt oman yvir tað:

»Hatað skalt tú, tjaldrið, vera,/ aldri skalt tú ynnast,/ tú hevur spilt mær veitslu mína,/ hetta skal eg minnast«.



2. Jákuþ á Møn.

Tað sigst, at Páll yrkti hendan táttin um ein sambiðil — ein sum hevði hug á somu gentu, sum Páll sjálvur. Hann vildi gera hann til láturs. Prógv eru ongantíð fingin fyri hesi hugsan, og helst man tað vera so, at Nólsoyar Páll, sum hevði verið úti í stóru verð, við hesum tátti ikki hugsar um einstakan mann, men drívur spott við hugtak-inum »heimføðingurin«.

Gongdin er í stuttum hendan: Jákup á Møn er nýfermdur unglingi — heimføðingur av ringasta slag. Hann setir sær fyri at fara at biðja um Gyðju Haraldsdóttur. Hann fær sær bátsskipan at rógva seg yvir um fjørð, hann skal ganga til bygdar, har Gyðja býr, roynir at stimbra seg við brennivíni, men hetta virkar øvugt. Hann finnur sær eitt ross, men hetta tveitir Jákup í sortudíkið, og seinni dettur hann í Haraldskøst.

Menninir í bygdini eru á útróðri, so konufólkini noyðast at bjarga hesum vanlukku fríggjara og fáa hann reinan aftur. Imeðan kemur báturin aftur av útróðri, og Haraldur leggur hann í eina song.

Tá ið Jákup vaknar morgunin eftir og ber fram bønarorðini, fær hann — sum ikki er so løgið — nei

frá gentuni, og so fara genturnar í bygdini at brenna krakk — hetta var siður, tá fríggjari varð rikin av bygdini uttan at hava fingið gentu. Mamma Jákups, sum sær allan roykin, misskilir, tekur at rópa grindaboð og sendir bátin avstað. Tá báturin kemur fram, stendur Jákup fyri honum, og tá bátsmenn fregnast um, hvar grindin man vera, svarar hann við hesum viðgitna ørindi:



Her er roykur og eingin grind,/tit skulu hava takk,/ gentumar á Eysturlandi/ brenna eftir mær krakk«.

Jákup fer so heim aftur og vil ikki síggja konufólk aftur í sínum lívi.

3. Fruntatáttur.

Um orsøkina til, at hesin táttur verð yrktur, er hendan søgan: »Ein maður nevndur Jóhan á Uppsølum í Klaksvík, sum tá var húskallur hjá Pálli og seinni kom at sigla við honum við »Royndini«, var trúlov-aður við eini gentu, sum fjeppaðist uppi í hesum nýggja klædnamótanum og hármótanum (at klippa sær frunt), men hann varð narraður av hesi somu gentu og svór tá hevnd yvir hana og alt fruntaslagið. Hann fekk so Páll at yrkja táttin«.

Í táttinum tekur yrkjarin fram fleiri dømi úr stóru verð og úr søguni um, at ikki nýttist gentum tá at klippa sær frunt fyri at fáa drong.

Persónar, ið verða nevndir, og fremmand viðurskifti, ið verða havd á lofti, bera boð um, at yrkjarin er maður, ið hevur lisið nógv og ferðast víða, hann nevnir eitt nú Dinu og Sikem, Bóas og Ruth, Esther og Ahasverus úr Gamla testamenti, og úr Egyptalands søgu hina tiltiknu Kleopatru.



Fruntagentan

Sjóvarbóndin

Sjóvarbóndin er kendasti *kvæðayrkjari* okkara, men hann verður umrøddur her, tí hann eisini hevur yrkt tættir og tí hann hoyrir til hesa tíðina.

LÍVSSØGA

Jens Chr. Djurhuus, Sjóvarbóndin kallaður, av tí at hann var bóndi við Sjógv í Kollafirði, varð føddur inni á Nesi í 1773.

Sagt verður frá — prógv er tó einki — at hann gekk í latínskúla í Havn. Annars vita vit merkiliga lítið um henda mann, men vit kunnu siga, at hann hevur havt stóran áhuga fyri gomlum nørrønum søgum, tí úr hesum hevur hann yrkt flestu av kvæðum sínum.


Sjóvarbóndin doyði í 1853.

BOKMENTAVERK:

Sum nevnt var Sjóvarbóndin fyrst og fremst kvæðayrkjari, og nú viðgera vit fyrst tey trý kvæðini »Ormurin langi« — yrktur eftir »Heimskringlu«, »Sigmundar kvæði« og »Leivs kvæði« — bæði yrkt eftir »Føroyingasøgu«. At enda taka vit táttin »Leirvíks Páll«.

Ormurin Langi:

Kvæðið man vera yrkt onkuntíð um leið 1810 burtur úr Heimskringlu. Sagt verður frá ferðini hjá norska konginum Ólavi Trygvason við stóra og prýðiliga víkingaskipinum »Orminum Langa«. Hann kemur í bardaga við teir tríggjar, danakong, sviakong og norðmannin Eirik jall; lítið nyttar teimum báðum fyrrnevndu at herja á, men sum tikið





verður til: »snarpur verður hild-arleikur/ tá norðmenn mót norskum stríða. »Tá tað berst saman millum teir báðar Olav og Eirik, verður bardagin øgiligur: »høvur og kroppar í havið tumla,/ øgiligt var at síggja«, mannfallið er stórt, og at enda má Ólavur leggja monnum sínum hesi ráð:

»Leypið í havið, mínir menn,/ her verður ei góður endi«.

Hann kastar seg sjálvur fyri borð og druknar. Eirikur jallur »tók tá »Ormin langa«,/ eingin annar kundi« og stýrir honum longur fram á leið.

Hetta kvæðið man vera eitt hitt best umtókta og mest kvødna av øllum føroyskum kvæðum.

Sigmundar kvæði:
Hetta er kvæðið, sum byrjar við hesum ørindi:

»Í Føroyum har búgva høvdingar tveir/ Tróndur og Sigmundur eita teir«.

Og um hesar báðar høvdingar og menn teirra snýr kvæðið seg. Tróndur siglir á nátt suður til Skúvoyar, brýtur dyr hjá Sigmundi og setir eld á.

Sigmundur flýggjar saman við sínum góðu og trúgvu vinmonnum, Einari og Tóra norður á oynna. Tróndur heldur aftaná. Eftir stuttan samanbrest noyðast teir tríggir vinmenninir at kasta seg í havið og leggja á Suðuroyarfjørð at svimja. Leiðin gongur móti Sandvík.

Einar og Tórir leggjast fyri og drukna, hóast Sigmundur veitir teimum ta hjálp, hann kann. Sjálvur vinnur hann upp land, men verður dripin har í taranum av Torgrími Illa og sonum hansara.

Leivs kvæði:
Hetta kvæðið er eins og hitt undanfarna yrkt við tilfari úr Føroyingasøgu sum grundarlagi.


Eftir deyða Sigmundar fer Leivur Øssursson, fostursonur Tróndar, biðlaferð suður til Skúvoyar at biðja um Tóru Sigmundsdóttir. Tóra leggur tær treytir á, at um hann vil fáa hana til konu, so skal hann fyrst svørja, at hann ikki var við uppi í ráðagerðini móti Sigmundi, síðani skal hann nevna banamann Sigmundar og at enda hevna deyða Sigmundar.

Alt fyri eitt sum Tróndur í Gøtu fær at vita treytirnar, biður hann Leiv taka hetta sinniliga, hetta skal hann — Tróndur — skipa fyri. Hann ger so ferð suður til Sandvíkar at vitja banamann Sigmundar, Torgrím Illa. Hann fær góða móttøku.

Tá menn eru sessaðir í høllini, letur Tróndur kynda eld á eldstaðin, og so manar hann teir tríggjar fram: Einar og Tórir koma inn, og sjógvurin drívur av teimum — teir báðir vóru druknaðir, men tá Sigmundur kemur inn og ber høvur undir hond, tá tykist prógvað, at hann er hálshøgdur, og Tróndur sigur, at Torgrímur er drápsmaðurin. Hesin verður so tikin, og saman við sonum sínum verður hann tikin av døgum — hongdur í gálgatræ.

Leivur siglir eftir hetta til Skúvoyar og fær har ja-orð frá Tóru Sigmundsdóttir, og tey giftast.

Leirvíks Páll:
Hesin táttur er yrktur eftir eini gamlari søgn.



Páll, ein løgin stavnur úr Leirvík, ger ferð til Velbastaðar at vitja Ellind, sum hann einaferð hevur arbeitt hjá. Á ferðini — leiðin gongur um Gøtu, Glyvrar, Strendur, Hvítanes og Havn — ger hann sær til góðar av tí frálíka mati, honum verður boðin.

Í Havn fer hann inn í kongliga handilin við nøkrum vørum at avreiða og skal keypa okkurt við sær aftur, men tað vísir seg, at handilin ikki hevur sjálvt tær vanligastu vørurnar.

Páll heldur síni ferð til Velbastaðar, har hann verður væl fagnaður av Ellindi á Steinum, men ringur verður endin: Ein dagin, teir standa í arbeiði, koma teir upp at berjast. Ellindur verður við undirlutan og missir lív.

Umfarmt at vera ein skemtilig frásøgn hevur hesin táttur eisini stórt virði sum siðsøguligt tilfar: Tú fært at vita um klædnabúna føroyinga, ferðingamøguleikarnar við síni skjútsskipan og tey vánaligu handilsviðurskiftini.

Jens Hendrik Djurhuus

Lívssøga:
Sjóvarbóndin, Jens Chr. Djurhuus, ið júst er viðgjørdur her framman-fyri, átti ein son, sum æt Jens Hendrik Djurhuus. Hann var føddur í 1799. Hann tók við festinum við Sjógv í Kollafirði eftir faðirin og yrkti eins og hann kvæði burtur úr gomlum søgum. Hann doyði í 1892.

Bókmentaverk:
Jens Hendrik er fyrst og fremst kvæðayrkjari, men hann yrkti eisini nakrar tættir. Her verður sagt frá tveimum av kvæðum hansara: »Gudbrands kvæði«, yrkt burtur úr søgu Olavs Halga, og »Gøtuskeggjar«, yrkt burtur úr Føroyingasøgu:

Gudbrandskvæði:
Vit eru stødd í Gudbrandsdalinum í Noregi, har Gudbrandur er høvdingi — hann er heiðin maður. Ólavur hin Heilagi hevur sett sær fyri at kristna alt Noreg; hann sendir Gudbrandi boð um at lata seg kristna, ella verður bardagi burturúr. Gudbrandur gamli sendir sonin Gudbrand Gudbrandsson á fund Ólavs Halga — har tekur hesin ungi við kristnari trúgv, og tá hann kemur heim aftur, biður hann faðirin gera tað sama. Hetta vil gamli Gudbrandur ikki, ilt verður millum faðir og son, og Gudbrandur gamli letur kongin kalla inn á Dalatingið. Hann ætlar sær at bera standmynd av Tóri gudi á tingið og væntar tá, at kongurin verður við undirlutan.

Men øðrvísi gongur. Kongur lesur upp kristna læru á tinginum, biður menn taka við hesi nýggju

rúnni, og tá bílætið av Tóri gudi verður borið inn, smildrar ein av kongsins monnum tað við eini sleggju; rottur og ljótir ormar tysja tá út úr Gudamyndini, og í somu løtu sigur kongur við Gudbrand: »Vilt tú skoða sannan Gud,/ skoða tá hans verkið!/ Hygg tær mót eystri upp,/ har kemur hans tjenari sterki«. Sólin rísur tá í sínum ljóma, og tá hevur kongur vunnið á Gudbrandi, sum at enda sigur: »Kongur, eg skal trúgva tær/ og taka við Gudi eina:/ Doyp tú meg í Harrans navn/ við mínar menn og sveinar!«.

Gøtuskeggjar:
Kvæðið sigur frá biðlaferð Gøtu-skeggja suður til Skúvoyar, har Tórður Lági ætlar at biðja um Turið, einkjuna eftir Sigmund.

Hin framfúsi Sjúrður Tollaksson førir orðið, hann hittir Turið og ber fram heilsuna frá Tórði. Turið svarar, at helst vildi hon átt Sjúrð sjálvan til mann; men hetta ger hon av svikum, og tá hann ger seg til at fevna hana, heldur hon í kappan, so hann ongan veg sleppur, og nú leypa synir Turiðar og Sigmundar av húsum við drignum svørði.

Tað eydnast kortini Sjúrði at smoyggja kappan fram av sær, og so heldur hann til beins oman gjøgnum Skúvoyarbø; Hergeir Sig-mundsson er honum tá so nær, at hann kastar spjótið eftir honum, men Sjúrður er kvikur, kastar seg fram eftir rommum, so spjótið flýgur yvir honum, hann rippir tað til sín og sendir tað gjøgnum Hergeir, sum her fær bana.

Nú er Leivur Øssursson, versonur



Turiðar, komin Sjúrði so nær, at hann fær høgt hann við svørði í síðuna, áðrenn hesin loypur inn í bátin og setir seg til róðurs.

Í illveðri rógva gøtuskeggjar norður um Trøllhøvda — Sjúrður stýrir við banasári — og teir lenda í Sugguni við Kirkjubø. Sjúrður gongur niðan frá bátinum, og tá hinir koma niðanfrá, finna teir hann standandi deyðan upp móti neystavegginum.

Leivur Øssurson og Sigmundssynir manna bát og koma aftaná Gøtuskeggjum til Kirkjubøar, teir bera eld á garðin; reka harvið Gøtuskeggjar út, og her verða teir dripnir av skúvoyingum.

Kvæðið endar við, at Tróndur í Gøtu gamli doyr av sorg um at hava mist bestu menn sínar.

AÐRAR BÓKMENTIR:

Poul F. Joensen:
»Nøkur orð um Ánaniasartátt«. Varðin 4, s. 110.

Jako b Jako bsen:
»Poul Nolsøe — lívssøga og irkingar« 1912.

Rikard Long:
»Fuglakvæði eftir Poul Nolsøe«, 1929.

Marius Johannessen:
Viðmerkingar í verkinum «Tættir I —V«.